# Hoyribrekað fáa eingi hoyritól

**Sernámsdepilin hevur steðgað innkeypinum av øllum hjálparhoyritólum fyribils. Orsøkin er, at Mentamálastýrið vil broyta mannagongdina í sambandi við innkeyp. Hoyribrekað mugu tískil brynja seg við toli, til nýggj mannagongd er funnin**




*Sernámsdepilin hevur steðgað innkeypinum av hoyritólum. Hoyribrekað mugu tískil brynja seg við toli*

HOYRITÓL
*Stefan í Skorini*

Hoyribrekað, ið hava tørv á hjálparhoyritólum, fáa ikki hjálp frá Sernámsdeplinum í hesum døgum. Depilin hevur steðgað øllum innkeypi at hjálparhoyri-tólum, tí Almannastovan og Mentamálastýrið krevja mannagongdina broytta.

Henda støðan hevur verið í tríggjar vikur, og tey, sum eru til kanningar á Sernámsdeplinum við tí fyri eygað at fáa hoyritól, fara sum av torvheiðum.

– Vit hava valt at steðga innkeypinum av hjálparhoyritólum, so leingi sum eingin føst mannagongd er á hesum økinum, sigur Hans Eli Dahl, leiðari á Sernámsdeplinum.

### Umsókn fyrst

Vanligt hevur verið, at fólk við trupulleikum hava verið til kanningar hjá serfrøðinginum á Sernámsd-eplinum, og tann hoyribrekaði hevur so fingið eitt hóskandi hoyritól beinanvegin, sum Sernámsdepilin í fyrsta umfari hevur goldið fyri.

Síðani er ein umsókn send Almannastovuni um stuðul til keyp av hoyritóli, og Sernámsdepilin hevur fingið upphæddina endurgoldna.

Henda mannagongd skal nú broytast. Almannastovan vil sleppa av viðgera umsóknina, áðrenn hoyritólið verður keypt.

Hans Eli Dahl vísir á, at henda mannagongd ikki letur seg gera. Orsøkin er, at ein persónur við tørvi á hoyritóli ofta skal royna fleiri tól, áðrenn funnið verður fram til tað rætta. Tí er trupult at fremja tað ætlanina í verki.

Hans Eli Dahl leggur tó dent á, at hetta ikki er nøkur kreppustøða, Sernámsdepilin er í. Allir tríggir stovnarnir arbeiða í løtuni við at finna eina loysn, og hon verður vónandi skjót.

Sernámsdepilin kann tó ikki liva við verandi støðu leingi afturat, og tí er neyðugt at finna eina skjóta loysn, sum allir partar kunnu liva við.

Fyrr hevur verið vanligt, at frávik eru gjørd í sambandi við innkeyp av hoyritólum við tí fyri eygað, at fólk skulu sleppa undan langari bíðitíð.

– Inntil alt er púra greitt á hesum økinum, og vit vita, hvat Almannastovan velur at veita stuðul til, keypa vit ikki fleiri hoyritól, sigur Hans Eli Dahl.


HYGG HER

Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Brúktir bilar til sølu

| Verksmiðjumerki | km. | mán. | árg. | søluprísur |
|---|---|---|---|---|
| Suzuki Baleno 1,3 3h | 110.500 | Mai. | 1996 | 55.000,- |
| Citroen BX 1,6 Selection 5h | 55.000 | Aug. | 1992 | 60.000,- |
| MMC Pajero 3h | 206.500 | Sep. | 1986 | 60.000,- |
| MMC Lancer | 116.000 | Juni. | 1992 | 65.000,- |
| Citroen ZX 1,4i 5h | 182.000 | Aug. | 1993 | 84.000,- |
| Citroen ZX 1,4 Image 5h | 63.000 | Mars | 1996 | 70.000,- |
| Ford Escort 1,6 CLX 4 h | 167.000 | Nov. | 1995 | 64.000,- |
| MMC Galant 2,0 GTI | 170.000 | Mai. | 1989 | 69.000,- |
| Kia Sportage 2,0i | 42.500 | Okt. | 1997 | 100.000,- |
| Honda Civic 1,4i 5h | 116.500 | Des. | 1995 | 88.000,- |
| Nissan Primera 2,0SLX 4h | 25.000 | Aug. | 1997 | 129.000,- |
| MMC Carisma 1,8 GDI 4h | 31.500 | Sep. | 1998 | 138.000,- |
| Mercedes Sprinter 212 | 229.000 | Mai. | 1997 | 130.000,- |
| Citroen Bx 1,9 GTI | 250.000 | | 1988 | 25.000,- |
| Mitsubishi Pajero 2,5TD | 229.000 | Okt. | 1988 | 38.000,- |
| Opel Corsa 1,4 Swing 5h | 53.000 | Jan. | 1994 | 89.000,- |
| Mazda 323 Sedan | | | Gamal | 10.000,- |

Vælkomin til
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo


## Múrurin fingið størri játtan

FÍGGJARLÓGIN
*Stefan í Skorini*



*Játtanin til varðveitslu av Kirkjubømúrinum er hækkað munandi á komandi fíggjarlóg*

Játtanin til Kirkjubømúrin er nærum tvífaldað undir komandi fíggjarlóg. Í ár vórðu játtaðar 800.000 krónur til varðveiting av múrinum, men á komandi fíggjarlóg er 1,5 millión sett av til fornminnið í Kirkjubø. Í ár 2003 eru 2 milliónir settar av til varðveitslu av Kirkjubømúrinum.

Í løtuni arbeiðir ein nevnd við at finna bestu loysnina, hvussu múrurin skal varðveitast, men Petur Zachariassen, formaður, sigur, at enn er arbeiðið ikki komið nóg væl áleiðis, at hann kann úttala seg um, hvussu farið verður fram.

Higartil hava løgfrøðiligar forðingar seinkað varðveitsluarbeiðnum við Kirkjubømúrinum. Greitt er tó, at varðveitingararbeiðið byrjar komandi ár.

## Meiriluti fyri samanlegging

KANNING
*Stefan í Skorini*



*Borgarstjórarnir Rodmundur Nielsen og Kári Johannesen fegnast um, at ein veljarakanning vísir ein greiðan meiriluta fyri eini samanlegging*

Útvarp Føroya gjørdi í gjár eina veljarakanning millum fólk á Skála og Runavík. Spurningurin var, hvørt fólk tóku undir við, at báðar kommunurnar á Skálafjørðinum leggja saman. Stórur meiriluti var fyri at fremja samanleggingina.

212 fólk ringdu inn til kanningina, og tey flestu stuðlaðu samanleggingini. 121 fólk ringdu úr Runavík og 91 av Skála. Av runavíkingum søgdu 86,8% ja og 13% søgdu nei. Á Skála søgdu 92% ja og 7,7 % nei. Útvarpið leggur dent á, at hetta er ein lurtarakanning, og tí skal hon takast við stórum fyrivarni.

Borgarstjórarnir fegnast um úrslitið av kanningini, og teir halda, at hon gevur eina greiða ábending um meiningina hjá fólki í teirra kommununum.

Fólkaatkvøða verður mánadagin á Skála og týsdagin í Runavík. Bygdaráðið á Skála krevur, at 2/3 av teimum, sum greiða atkvøðu, skulu vera fyri, men í Runavík krevst bara ein meiriluti.

Sáttmálin verður undirskrivaður mikudagin 10. oktober, um fólkið samtykkir ætlanirnar.



# Fer at viðgera yvirgang



*Jóannes Eidesgaard fer at viðgera føroyska partin í st´riðnum móti altjóða yvirgangi, tá hann fær orðið á Fólkatingi*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Tá hann fær orðið á Fólkatingi, ætlar Jóannes Eidesgaard, fólkatingsmaður, sær at viðgera tann partin av røðuni hjá forsætisráðharranum, sum snýr seg um føroyska luttøku í stríðnum móti yvirgangi**

POLITIKKUR
*Edvard Joensen*

Tað mest áhugaverda, sum forsætisráðharrin segðium Føroyar í setanarrøðuni var, at vit verða drigin upp í stríðið móti altjóða yvirgangi, heldur Jóannes Eidesgaard, fólkatingsmaður.

Tá Jóannes Eidesgaard fær orðið undir viðgerðini av setanarrøðu forsætisráðharrans í Fólkatinginum, fer hann at viðgera tann partin av røðuni, sum snúði seg um føroyska luttøku í stríðnum móti altjóða yvirgangi.

Jóannes Eidesgaard, sum var staddur í Bretlandi, tá Fólkaingið varð sett, hevur lisið røðuna hjá Poul Nyrup Rasmussen, forsætisráðharra.

Serliga hevur hann, sum vera man, lagt seg eftir tí, sum hevur við Føroyar at gera.

Tað er ikki stórvegis annað, enn vanligt hevur verið, sigur Jóannes Eidesgaard, sum forsætisráðharrin sigur um Føroyar í røðu síni.

Men tó verður nomið við, at Føroyar eiga at luttaka aktivt í altjóða stríðnum móti yvirgangi. Og tað málið heldur Jóannes Eidesgaard vera so áhugavert, at hann ætlar sær at viðgera tað, tá hann fær orðið á Fólkatingi.

### Líkir

Jóannes Eidesgaard var staddur á landsfundi hjá bretska Arbeiðaraflokkinum, tá Fólkatingið varð sett.

Eftir at hava lisið hoyrt bretska forsætisráðharran, Tony Blair, og lisið røðuna hjá Nyrup, sigur Jóannes Eidesgaard, at teir eru rættiliga líkir í síni støðutakan til tað, sum hent er í seinastuni.

Tony Blair var sera avgjørdur, tá hann talaði á landsfundinum, sigur Jóannes Eidesgaaard. Har var eingin seming at hóma yvirhøvur. Yvirgangur skal takast álvarsliga og má steðgast.

Tað nam serliga við, tá hann segði, at 80 prosent av øllum heroini, sum selt verður á gøtunum í bretsku býunum, kemur úr Afganistan, og at talebanarnir fíggja síni vápnakeyp við pengum hiðani.

Tony Blair hevur markerað seg sera væl í hesum kjakinum, sum komið er upp eftir hendingarnar í USA tann 11. september, sigur Jóannes Eidesgaard, sum sigur seg vera inspireraðan av Blair á bretska landsfundinum.

### Nevndin í lagi

Jóannes Eidesgaard sigur annars um røðuna hjá forsætisráðharranum, at hann tekur undir við, at ein embætismannanevnd verður sett at viðgera yvirtøkuætlaninar hjá landsstýrinum, soleiðis um Frank Jensen, løgmálaráðharri, og nú eisini bæði løgmaður og varaløgmaður mæla til.

Um tað er ein felags nevnd ella ein donsk og ein føroysk nevnd, hevur fyri so vítt ikki tann stóra týdningin, bara arbeiðið veðrur gjørt til lítar, sigur Jóannes Eidesgaard. Tað, sum er allarmest umráðandi beint nú, er at vit koma væl frá byrjan, sigur hann.

Hann heldur eisini, at tá Høgni Hoydal nú mælir til at seta eina føroyska og eina danska nevnd, merkir tað, at hann »er komin upp á betri tankar«, sum Jóannes Eidesgaard tekur til.

Jóannes Eidesgaard lesur røðuna hjá forsætisráðharranum soleiðis, at hann er sinnaður at gera broytingar í Heimastýrislógini fyri at koma víðari í sjálvstýrisgongd føroyinga.

Hetta er tað, sum Javnaðarflokkurin fyrr hevur lagt upp til, og tí tekur formaður floksins sjálvandi eisini undir við. Men hann ivast í, um landsstýrið er til reiðar til hesa loysnina enn, sigur hann.

– Hetta er eitt stríðsmál, sum Nyrup nú leggur upp til, men eg meti tað vera skilagott at broyta Heimastýrislógina, sigur Jóannes Eidesgaard, fólkatingsmaður, í viðmerking til setanarrøðu forsætisráðharrans á Fólkatingi.





